# Lýsing eftir mekanikarum

P/F Petur Larsen søkir við hesum eftir mekanikarum at byrja skjótast tilber.

**Førleikakrøv:** Útbúgving í minsta lagi sum maskinsmiðjur.

**Kravt verður av umsøkjarum, at hesir hava førleika í:**

- Arbeiði við rustfríum tilfari, sum umfatar sveising og bukking.
- Arbeiði við aluminium, sveising og bukking v.m.
- Arbeiði við dreyðing og fresing.
- Arbeiði við rørlegging
- Annars alt vanligt maskinarbeiði.
- Aftrat omanfyri nevndu krøvum verður upplæring í arbeiði við Baader flakamaskinum og Fomaco saltsproytum.

Løn sambært avtalu.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til P/F Petur Larsen á tlf. 444174 í vanligari arbeiðstíð millum kl. 8.00 og 17.00.

Møguligar umsóknir, ið skulu verða skrivligar, skulu vera P/F Petur Larsen, Postboks 64, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi 1. juni 2006 kl. 16.00.

Felagið skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

**P/F Petur Larsen**
Bakkavegur
530 Fuglafjørður



## Lærarastørv í Viðareiðis Skúla

Tíðaravmarkað størv skúlaárið 2006/2007 í Viðareiðis Skúla verða lýst leys til setan frá 1. august 2006

***Søkt verður eftir:***
· einum lærara til fulltíðarstarv
· einum lærara til avlopstímar. Starvið er umleið 14 tímar um vikuna. Endaliga tímatalið verður fastsett í september.

***Tey, ið sett verða skulu:***
· undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
· duga at samstarva
· verða fús at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
· verða við til áhaldandi at menna skúlan

***Skúlanum tørvar lærarar, ið m.a. kunnu átaka sær:***
· flokslærarauppgávu
· undirvísa í føroyskum, donskum og enskum
· undirvísa í handaligu lærugreinunum
· undirvísa í ítrótti
· undirvísa í kristni
· serligan tørv
· kt

***Førleikakrøv***
Læraraútbúgving ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

***Løn***
Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

***Umsóknir***
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 2. juni kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Jensebeth Absalonsen, skúlaleiðara á tlf. 45 11 80 ella 58 80 52.

**Viðareiðis Skúli**
Fo – 750 Viðareiði
Tlf. 451180 – 588052
Teldupostur: vid@skulin.fo

*Viðareiðis skúli hevur komandi skúlaár 48 næmingar frá 1. – 7. flokk í fýra flokkum og 6 lærarar.*

*Viðareiðis skúli er ein nútímans skúli við góðum umstøðum bæði fyri næmingar og lærarar.*

BRIO hauck Simo CARENA

**Flugunet & regnskjól fylgja við ókeypis.**



Keyp barnavogn frá okkum og fá 10% av alla vøru í eitt heilt ár.

B&B ...eitt sindur betri
Baby & Barnaútgerð
Niels Finsensgøta 12 - Tórshavn - 315101

**Arbeiðshandskar**
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi
Beinleiðis frá framleiðara
Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar
ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo
Sosialurin 311820

**Søkt verður eftir mekanikara/maskinsmiði til verkstað okkara.**

Arbeiði fevnir um, at hava dagligu leiðsluna av verkstaðnum har afturat kundarøkt, umvælingar, servisu v.m.

Umsøkjarin má verða mekanikari ella hava aðra viðkomandi útbúgving.

sp/f Ó.K. HEILSØLA & MASKINUR
Handilin á kajuni í Hvalvík • Tel. 422 394 • www.okheilsola.com

**Góðu skálvíkingar og øll, ið hava tilknýti til bygdina!**



# ÚTISETADAGUR Í SKÁLAVÍK

**27. mei 2006 verður útisetadagur á Keldu**

**SKRÁ:**
kl. 10.00 Morgunmatur
Aftaná morgunmatin verður gongurtúrur um bygdina við frásøgumanni at fríska upp gomul minni.

kl. 16.00 Fyrilestur um bygdina.

kl. 18.00 Borðhald við undirhaldi og sangi.

**TILMELDINGARFREISTIN 21.05.06**

| **Kostnaður:** | | **Tekning hjá stigtakarunum:** | |
|---|---|---|---|
| Vaksin | 250,- | Atli Dalsgaard | tel. 21 77 79 |
| Børn 7-14 ár | 100,- | Elisabeth Myllhamar | tel. 21 11 67 |
| Børn undir 7 ár ókeypis. | | Ragna Leifsdóttir | tel. 36 12 62 |

Skal gjaldast á kt. nr. 9181 - 149.317.7

DIMMALÆTTING




**GSM telefonir &**

**GSM & VHF telefonir v.m til skip og bátar**

Storno SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 · Tórshavn
Tel 31 44 14 · Fax 31 80 45
storno@post.olivant.fo

Lesið Sosialin